

- Higartil hava føroyskir leiðarar verið noyddir at farið í onnur lond at taka eina veruliga MBA-útbúgving. Hetta vilja vit broyta við nýggja møguleikanum, har lesandi kunnu gleða seg til eina útbúgving við undirvísing, sum fyrst og fremst fer fram í Føroyum og sum virkar eftir leiðaranna egna gerandisdegi, sigur Leif Bergmann, stjóri á Henley Management College Føroya

## FAKTA

Fyrilestrarnir í Kelduni Henley Management College veitir eina av heimsins bestu MBA-útbúgvingum.

*7.000 MBA-lesandi úr fleiri enn 100 londum lesa hjá Henley og teimum 42 samstarvsfeløgunum kring allan heimin.*

*Sambært seinastu uppgerðunum hjá The Economist er Henley besti handilsskúli í heiminum í persónligari mennin og útbúgvingarroyndum.*

*Henley, sum er grundaður í 1945, er elsti óhefti handilsskúli í Evropu.*

Sambært seinastu uppgerðunum hjá The Economist er Henley besti handilsskúli í heiminum í persónligari menning og útbúgvingarroyndum

# Føroyar sína egnu MBA-útbúgving

**Føroyskir leiðarar fáa nú á fyrsta sinni høvi at taka eina altjóða viðurkenda MBA-útbúgving í Føroyum. Stjórin í Henley Management College, Leif Bergmann, verður ein av fyrilestrarhaldarunum á vinnuráðstevnuni hjá FaroExpo í Skálafirði seinnapartin týsdagin**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í februar 2008 kunnu føroyskir leiðarar fara undir eina altjóða viðurkenda MBA-útbúgving í Havn.

Tað er Henley Management College, ið hevur tikið stig til hesa nýggju útbúgving, sum ætlandi skal hækka leiðslustøðið í Føroyum til gagns fyri føroyskt vinnulív.

Lesturin byrjar í februar 2008.

## Vaksandi áhugi

Stjórin í Henley Management College, Leif Bergmann, sigur, at teir hava varnast ein veksandi áhuga fyri altjóða leiðaramenning í Føroyum, men higartil hava føroyskir leiðarar verið noyddir at farið í onnur lond at taka eina veruliga MBA-útbúgving.

- Vit vilja nú gera tað møguligt at taka hesa útbúgving í Føroyum, soleiðis at hon eisini virkar eftir leiðarans egna gerandisdegi og teirra egnu avbjóðingum, sigur hann.

Henley Management College í Bretlandi er ein av heimsins fremstu handilsskúlum, og í løtuni lesa um leið 7000 fólk úr fleiri enn 100 londum á Henley.

## Praktiskari læring

At Henley nú kemur til Føroya er ikki minst Jens Christiani Olsen, stjóra á Fiskamarknaði Føroya, fyri at takka.

Hann hevur sjálvur lisið á Henley Managment College og varð liðugur við MBA-lesturin í 2006.

Eftir at vera liðugur, vendi hann sær til Henley-deildina í Danmark við tí í hyggju at fáa MBA-útbúgvingina til Føroya.

- Okkum tørvar dugnaligar føroyskar leiðarar við rætta førleikanum. Eg haldi, at mong kunnu fáa stórt gagn av eini skipaðari leiðaraaútbúgving, sum skilir seg frá øðrum, tí verkevnini snúgva seg um títt egna virki. Á tann hátt kann læran verða brúkt beinleiðis í verki, og tú fært amboð at brúka beinleiðis í gerandisdegnum. Taðeraðalhugsanin, sum Henley byggir á.

Tað sigur Jens Christian Olsen.

Hann las á Henley, meðan hann búði í Bretlandi, Noregi og nú í Føroyum. Á leiðini hevur hann eisini nýtt høvið at fáa sær ein steðg í lesnaðinum, og sjálvur vísir hann á, at hesin smidleiki í útbúgvingini gjørdi sítt til, at hann kundi gera seg lidnan við MBA-lesnaðin.

## Viðurkend MBA

Áðrenn Jens Christian í síni tíð gjørdi av at fara undir MBA-útbúgvingina, kannaði hann gjølla teir mongu møguleikarnar á marknaðinum. Hjá honum var avgerandi, at Henley, sum ein av teimum fáu handilsskúlunum í heiminum, hevur fingið trífalda altjóða viðurkenning.

- Tað er umráðandi sum MBA-lesandi, at útbúgvingin hevur dygdarstempul frá einum av teimum bestu og viðurkendastu stovnunum. Hetta er ein av teimum bestu mátunum at tryggja sær, at tað, ið fæst burturúr, stendur mát við ta orku, sum brúkt verður til lesnaðin, sigur Jens Christian Olsen.

Hann heldur, at MBA er eitt flaggskip millum nútíðar leiðaraútbúgvingar. Útbúgvingin vendir sær fyrst og fremst til royndar leiðarar ella serfrøðingar, ið royna at skilja virkisleiðslu á hægsta stigi.

- MBA-útbúgvingin hjá Henley er løgd soleiðis til rættis, at hon verður tikin í trimum modulum, samstundis sum arbeitt verður. Eina ferð í hvørjum moduli fara tey lesandi til Onglands á arbeiðsskeið á Henley Management College.

Lesnaður tekur vanliga 3 ár.

## Kunningarfundir

MBA-útbúgvingin byrjar sum nevnt í Føroyum í februar 2008, men fyri ta tíð fer Henley at skipa fyri tveimum kunningarfundum á Hotell Føroyum.

Fundirnir verða ávikavist tann 31. oktober og 4. desember frá klokkan 16-18.

Tey, ið vilja hava meira at vita um útbúgvingina, kunnu venda sær til Leif Bergmann á adressuni leif@henley.dk

Føroyska MBA-útbúgvingin hevur eisini fingið heimasíðuna www.henley.fo

Jens Christian Olsen er eisini til reiðar at greiða frá útbúgvingini, og hann er at hitta á hesi adressu jens@fmf.fo

